# føroyskum flakavirki

dur Gladysar goldu fyri skúlagongdina hjá øllum børnum sínum. Tvær systrar hennara eru útbúnar bókhaldarar og tvær eru jarðarmøður.

Eftir at hava arbeitt sum lærari í fimm ár, flutti hon til Manilla, har hon við stuðli frá fólki úr Svøríki fekk høvi at lesa tónleik í tvey ár, og síðani fekk hon bjóðað starv í stórari evangeliskari kirkju í Manilla. Kirkjan hevði egnan skúla, tónleikaskúla og professionelt kór, og Gladys arbeiddi sum sanglærari um dagin og kórsangari um kvøldi.

> ” *Hon hevur søkt um at fáa útbúgving sína góðkenda her, men kravið er, at hon dugir føroyskt og tekur eina roynd á læraraskúlanum.*
> *- Men eg veit ikki, um eg nakrantíð fari at duga nóg væl føroyskt, sigur hon hugsunarsom.*

### Føroyskir fordómar

Gladys hevur eisini onkrar føroyskar vinir. Her hevur samkoman, sum hon gongur í, havt serligan týdning. Men sjálvt um hon ikki hevur møtt beinleiðis rasismu í Føroyum, so heldur Gladys, at summi fólk hava eina ov svart-hvíta mynd av Filipsoyggjunum.

Gladys fortelur um einaferð, hon fór at vitja eina føroyska familju. Tá hon skuldi koyra hurðina aftur, fekk hon ikki handtakið at rigga. Hon royndi at koyra hurðina aftur, men hon glapp upp aftur. Konan í húsinum sær, hvat hon stríðist við og sigur: Brúka tit ikki hurðar í Filipinunum?

- Hon segði tað ikki í óreinheit, men eg bleiv so kløkk og kedd, sigur Gladys.

### Føroyski maðurin

Framtíðin hjá Gladys lá ikki í lærarastarvinum í milliónabýnum Manilla. Hon hevði leingi havt hug at ferðast út í heim at uppliva okkurt annað. Í 2000 var hon tríggjar mánaðir í Svøríki og vitjaði familjurnar, sum høvdu stuðla útbúgving hennara, og í 2001 arbeiddi hon eitt hálvt ár sum lærari í Kina.

Afturkomin úr Kina, møtti hon einum stillum, blíðum hvítum manni heima hjá felags vinum. Maðurin var føroyingur, og hann var og vitjaði fólk, sum hann var komin at kenna, tá hann sigldi við hjálparskipinum Doulos. Tey gjørdust væl, og tá hann fór heimaftur, hildu tey sambandið við líka við at skriva. Í 2002 kom hann aftur, tey giftust, og fluttu til Føroyar.



> ” *Føroyska konan, sum sær hana stríðast við eina hurð, spyr: Brúka tit ikki hurðar í Filipinunum?*
> *- Hon segði tað ikki í óreinheit, men eg bleiv so kløkk og kedd, sigur Gladys.*

### Málið og arbeiðið

Gladys er í løtuni í barnsburðarfarloyvi, men annars arbeiðir hon á fiskavirki. Og tað er ikki júst tað, sum hon droymdi um, tá hon las til lærara í Filipsoyggjunum.

- Tá eg keypti inn á “wet market” í Manilla, bað eg altíð fiskahandlaran vaska fiskin fyri meg, tí eg helt fisk vera so ólekran. Og nú skilji eg lippir sum onki, sigur hon og flennir.

Tá mamma hennara var og vitjaði, var hon kedd um, hvussu hart arbeiði dóttirin hevði. Men tað er ikki so nógv at gera við tað, sigur Gladys. Hon hevur søkt um at fáa útbúgving sína góðkenda her, men kravið er, at hon dugir føroyskt og tekur eina roynd á læraraskúlanum.

- Men eg veit ikki, um eg nakrantíð fari at duga nóg væl føroyskt, sigur hon hugsunarsom.

# Føtur undir egið borð

Mikukvøldið 14. mars kl. 19.30 skipar Javni fyri áhugaverdum fundi í Klingruni í Norðurlandahúsinum.

Evnið á fundinum verður bústaðarviðurskiftini hjá fólki við menningartarni.

Javni vil fegin á henda hátt seta gongd á eitt kjak og eitt arbeiði, sum hevur til endamáls at betra um bústaðarviðurskiftini hjá fólki við menningartarni.

Vit vilja fegin seta økið á dagskrá og spyrja tí: Hvussu er støðan á økinum, og hvørji eru framtíðarútlitini.

Sambýlini og bústovnarnir vóru frambrot á bústaðarøkinum í síni tíð, men spurningurin er, um hesi framvegis nøkta tann tørv og tey ynski, sum tey, ið búgva á hesum bústøðum, hava.

Í Almanna- og heilsumálaráðnum verður arbeitt við einum bústaðarpakka, ið skal lata upp fyri nýggjum møguleikum, tá tað kemur til bústaðarviðurskifti hjá fólki við menningartarni. Enn vita vit ikki so nógv um, hvussu hesin bústaðarpakkin kemur at ávirka bústaðarviðurskiftini hjá fólki við menningartarni!




**Á fundinum fara vit úr ymiskum sjónarhornum at lýsa støðuna á bústaðarøkinum.**

- Hvat siga tey við menningartarni?
- Hvat siga foreldrini?
- Hvat siga politikararnir?

*Fundurin er almennur og øll eru hjartaliga vælkomin.*

# Elin heldur grækarismessurøðuna



*Elin Heinesen skal flyta fram røðu á Vaglinum í Havn tann 11. mars*

**Tað verður nýggi stjórin á Ferðaráðnum og Menningarstovuni, sum skal flyta fram grækarismessurøðu í Havn**

GRÆKARISMESSUHALD

*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Grækarismessuhaldið hjá Skótaliði Sigmunds Brestisonar verður á Vaglinum í Havn klokkan 15 sunnudagin, ið altso er 11. mars.

Undan hesum verður skrúðgonga eftir Bøgøtu, Tróndargøu og Niels Finsensgøtu, og fer Havnar Hornorkestur eisini at spæla til haldið.

Fyrireikararnir heita á alla skótar at møta ein tíma undan haldinum í skótahølum sínum.